# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*» Ikki minst, tá Anelka fekk hatta gula kortið. Tú fekk ilt í oyruni, sum tey ýldu«*

*Hanus Thorleifsson, B36*

# Høvdið hevur alt at siga

**Bæði umborð á Klaksvíkingi og Eysturoyingi rokna teir við, at tað ikki verður venjingarstøðan, men timingin, sum verður avgerandi fyri, hvør fer at vinna finaluna í hesum róðrarárinum**




*Við undantaki av eystanstevnuróðrinum hava eysturoyingur og klaksvíkingur hvørja ferð kappast um oddasessin. Higartil hava bátarnir vunnið tríggjar róðrar hvør, so á sín hátt er talan um finalu*

ÓLAVSØKA
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað ber illa til at ímynda sær annað, enn at Klaksvíkingur í morgin fer at vinna FM heitið fyri fyrstu ferð nakrantíð. Klaksvíkingur hevur 36 stig, og Eysturoyingur hevur 32 stig. Men hóast munin, sum tað er óhugsandi, at Eysturoyingur skal megna at taka aftur, so er spenningurin óvanliga stórur.

Hóast rógvararnir allir hava um enn ikki gloymt so goymt harmuliga róðurin á Skálafjørðinum, so er hann orsøk til øgiligan intensitet undan síðstu uppgerðini millum Eysturoying og Klaksvíking.

Klaksvíkingur hevur vunnið tríggjar ferðir – á Sundalagsstevnu, Eystanstevnu og Fjarðastevnu. Eysturoyingur hevur vunnið tríggjar ferðir – á Norðoyastevnu, Jóansøku og Vestanstevnu.

Umborð á Eysturoyingi siga teir seg bara hava kappast fimm ferðir við Klaksvíking, og í tí kappingini vísa teir á, at støðan er 3-2 til Eysturoying.

Tí sigur tað seg sjálvt, at bæði teir umborð á Klaksvíkingi og umborð á Eysturoyingi sera fegnir vilja vera fyrstir á mál í morgin.

## Hvør vinnur?

Tað er spurningurin, sum vit hava sett tveimum av úrmælingunum, sum í summar leygardag eftir leygardag hava verið við til at seta pumpuskipanirnar hjá so mongum monnum og kvinnum undir rættuligt trýst.

Annar teirra er Hilmar Sam Lamhauge, sum er ein av royndu monnunum umborð á Eysturoyingi, og hin er Svein Rógvi Nielsen, sum er bátsformaður á Klaksvíkingi, og sum í fjør var við til at vinna sannførandi FM við Nevinum Reyða.

- Sigurin verður vunnin í høvdinum. Tað er tann, sum fer at vísa størsta viljan, og sum meiri enn kappingarneytin verður førur fyri at fáa alt tað, sum er lagt í venjingarnar, út í árarnar, sum fer at vinna.

Tað er boðið hjá Hilmar Sam Lamhauge, sum ikki heldur stórvegis mun vera á venjingarstøðuni hjá favorittunum.

- Kanska eru bátarnir eitt sindur ymiskt mannaðir. Umborð hjá okkum eru teir báðir á toftini – Ludvík Justinussen og Jón Rosenblad – stórir, meðan allir hinir eru lættir. Klaksvíkingur er tyngri mannaður enn vit, og teir hava ivaleyst tilsaman størri styrki, enn vit hava, men tá ið alt verður gjørt upp, so hevur summarið víst, at tað hevur verið so mikið tætt okkara millum, at tað ikki ber til at siga nakað undan síðsta róðrinum.

Svein Rógvi Nielsen er samdur við arga kappingarneytan um uppskriftina fyri sigri í morgin, um enn hann orðar tað eitt sindur øðrvísi:

- Tann vinnur, sum er mest uppsettur og samstundis kaldur og harvið fer at hava bestu timingina soleiðis, at alt fæst at sita, sum tað eigur at gera.

Eysturoyingur hevur søguligu hagtølini á sínari síðu. Hann hevur vunnið væl meiri enn Klaksvíkingur. Men hetta heldur Hilmar Sam Lamhauge ikki fer at hava so stóran týdning í morgin:

- Klaksvíkingar fingu gott í beinini frá Stefan Mølvig í fjør, og tað hevur borið frukt. Tá ið tú eina ferð hevur smakkað, hvussu søtur sigurin í kapproðri er, so leggur tú nógv fyri aftur at fáa hesa kensluna. Tað vita vit alt um umborð á Eysturoyingi, men hóast vit hava nógvar royndir, so eru tað tveir, sum í ár eru fyri fyrstu ferð við í tøttu kappingini millum 10-mannaførini. So tað er hips um haps hjá okkum og Klaksvíkingi.

## Ymisk upplegg

Hesar seinastu tvær vikurnar hava róðraráhugaðir klaksvíkingar einki sæð til stolta hvíta 10-mannafarið á vánni. Orsøkin er tann, at Klaksvíkingur hevur vant á Havnarvág í tvær vikur. Tað hevur eisini nakað við tað at gera, at fleiri av manningini búgva aðra staðni enn í Klaksvík, og at hesir nú hava havt tað høgligari at fara til venjing, enn teir hava havt tað fyrr í ár.

- Vit hava fyrst og fremst vant teknikk og taktikk. Vit hava ongantíð vant við fullari ferð av Argjahøvda og inn á málið. Vit hava róð styttri teinar, og so hava vit tosað um tingini, og so aftur róð stuttan tein. Vit kenna allir málið heilt væl, og vit vita, hvat skal gerast fyri at vinna, sigur Svein Rógvi Nielsen.

Eysturoyingur hevur ikki vant á Havnarvág, og tað verður einki at síggja til sigursvanda gula bátin í høvuðsstaðnum fyrrenn hann verður flotaður til stóru finaluna.

- Í síðstu viku vandu vit í maskinunum. Serliga fyrra partin av vikuni vandu vit ógvuliga hart. Í hesi vikuni hava vit róð á fjørðinum. Vit hava vant teknikk og taktikk, og vit hava ikki lagt so nógv fyri, at vit dagin eftir venjing hava kent nakað til møði. Tú kanst siga, at vit hava trappað niður í hesi vikuni, sigur Hilmar Sam Lamhauge.

Klaksvíkingur verður flotaður á Havnarvág fyrrapartin í morgin. Soleiðis hava teir lagt tað til rættis alt summar, og soleiðis verður tað eisini undan síðsta róðrinum. Í kvøld fara teir á Eysturoyingi at venja. Síðani verður báturin drigin og í morgin fluttur til Havnar, har hann verður flotaður eina ferð seinnapartin.

Undan síðsta róðrinum er greitt, at júst hesar báðar manningarnar ikki fara at kappast aftur:

- Eg vóni, at fleiri fara at vera við til at manna bátin aftur næsta ár, men tað er greitt, at onkrir fara av, sigur Svein Rógvi Nielsen.

- Nú hava fleiri verið við at manna bátin í nógv ár. Tað verður tosað um, hvør fer at halda fram, og hvør fer at gevast. Ivaleyst fara fleiri at vera við til at manna bátin aftur næsta ár, men tað verður neyvan júst sama manningin sum í dag, sigur Hilmar Sam Lamhauge.

## Ríða ólavsøkudag

22 ross verða við í siðvandu kappríðingini, sum Føroya Ríðingarfelag skipar fyri á ólavsøku. Kappríðingin byrjar klokkan 14, og verður kappast í bólkunum, trav, tvíspor, ung, tvíspor 2. flokkur og tvíspor 1. flokkur.

**-mørk**

## Tvey FM standa upp á spæl

Ørnin við kvinnum er meistari, og Ritan við dreingjum og Sølmundur við monnum eru meistarar. Knørrur og Klaksvíkingur eru ikki meistarar, men tað skal vita ógvuliga illa við hjá báðum hesum manningunum, um tær ikki í morgin fara at tryggja sær meistaraheitið.

FM kappingin er fullkomuliga opin millum gentubátarnar, og tað er ikki frítt, at tað eisini er eitt sindur av spenningini í millum 6-mannaførini við kvinnum. Riddarin úr Miðvági hevur 34 stig, og Jarnbardur úr Knørrafelagnum hevur 31 stig. Jarnbardur hevur vunnið tríggjar tær seinastu ferðirnar. Men um tað skal eydnast Jarnbarði at vinna FM, so skulu tær vinna í morgin, og so skal onkur annar bátur eisini vinna á Riddaranum. Við úrslitunum higartil í ár í huga tykist hetta ikki sannlíkt, men tað er møguleiki fyri tveimum meistarum.

Í kappingini millum gentumanningarnar er støðan heilt einføld. Tann, sum kemur fyri á mál – Blikur ella Frúgvin – verður meistari. Báðir bátarnir hava fingið 31 stig burturúr seks teimum fyrstu róðrunum. Haraftrat ger tað júst hesa kappingina eyka spennandi, at Hvassi av Oyri vann á Vestanstevnuni. Í FM kappingini hevur Hvassi 21 stig og er harvið best fyri í kappingini um bronsumerkini. Men tær skulu ansa sær, tí Havfrúgvin og Drekin lúra aftanfyri við ávikavíst 20 og 19 stigum.

Men á Ólavsøku ber til hjá øllum manningum at syrgja fyri glæsiligum enda á róðrarárinum, og tað eru ætlanirnar og dreymarnir undan síðsta startskotinum, sum bera serligan spenning við sær.

**-jh**